# Ársfrágreiðing 2014 – Krabbameinsfelagið

- **GRANSKING**
- **FYRIBYRGING**
- **RÁÐGEVING, STUÐUL OG RØKT**

## Krabbameinsfelagið

Grønlandsvegur 58
Postboks 1216
110 Tórshavn
Telefon: 317 959
www.krabbamein.fo
T-postur: kmf@krabbamein.fo

**Dagligur leiðari:**
Jansy Gaardlykke
**Ráðgevandi sjúkrarøktarfrøðingur:**
Oddbjørg Johansen

## Nevndin í Krabbameinsfelagnum

| | |
|---|---|
| Formaður: | **Jákup N. Olsen** |
| Næstformaður: | **Aibritt á Plógv** |
| Kassameistari: | **Agnar á Dul** |
| Nevndarlimur: | **Sonja Nielsen** |
| Nevndarlimur: | **Katrin Kallsberg** |
| Tiltakslimur: | **Martin Joensen** |
| Tiltakslimur: | **Jóhan Poulsen** |

## Hjálpargrunnurin

Katrin Kallsberg
Jónvør Christiansen
Jákup N. Olsen

# Innihald


| | |
|---|---|
| **Fororð** | **3** |
| **Átøk, samstørv og annað virksemi** | **5** |
| **Ráðgevingarstova og hjálparbólkar** | **6** |
| **Virksemi í ymsu bólkunum** | **7** |
| **Tilboð til sjúklingar og avvarðandi** | **8** |
| **Krabbameinshagtøl** | **10** |

# Fororð



Sum vit líta aftur á árið 2014, kunnu vit enn einaferð ásanna, at Krabbameinsfelagið hevur stóra vælvildi millum føroyingar. Hetta merkja vit bæði frá myndugleikum, privatpersónum, fjølmiðlum, sjúklingum og avvarðandi.

Vit er takksom fyri hesa vælvild og gera okkara besta, fyri at liva upp til hesa vælvild. Vit trúgva at hetta kemst av, at vit í felag hava megnað at arbeitt miðvíst fram móti málinum. Tað munagóða arbeiðið, sum øll tey sjálvbodnu gera er ein av høvuðsorsøkunum til hetta.

Krabbameinsfelagið hevur verið sera sjónligt í 2014. Til dømis hava fjølmiðlar borið flest øll tíðindir, sum hava verið á heimasíðu okkara.

## Nýggj hagtøl

Tilsamans vóru 207 nýggir tilburðir av krabbameini staðfestir í Føroyum í 2014.

Lungnakrabbi telist eisini millum tey vanligastu sløgini av krabbameini. Árliga fáa millum 10-15 føroyingar staðfest lungnakrabba, og liggur hetta rættiliga støðugt.

Bróstkrabbi, sum millum kvinnur er vanligasta slagið av krabbameini, tykist liggja rættiliga støðugt. Hesi seinastu sjey árini, eru árliga millum 20 og 25 tilburðir staðfestir.

Prostatakrabbi er vanligasta slagið av krabbameini millum menn. Seinastu sjey árini eru millum 21 og 40 tilburðir staðfestir árliga.

Tilburðirnir av húðkrabba, sum vóru 22 í 2011 og 52 í 2013 eru nú 49 í 2014. Vónandi heldur talið fram at falla, komandi árini. Hinvegin er talið á skrásettum tilburðum av móðurmerkjakrabba fallið munandi, úr 16 í 2005 niður í 2 tilburðir í 2014.

## NCU staffettin víðari til Ísland

Eftir 3 ár við róðrið í Nordisk Cancer Union, lat Føroyar formansskapin víðari til Ísland 1. januar 2015. Ísland tekur yvir uppgávuna at stíla fyri NCU arbeiðinum trý tey komandi árini. Formansskapurin í Nordisk Cancer Union skiftir 3. hvørt ár.

Eg havi verið glaður fyri tíðina, sum formaður í NCU og fegnast um alt, sum er komið burturúr, ímeðan Føroyar hevur havt formanskapin. Granskingarstuðul á 750.000 euro um árið er latin til granskarar innan krabbamein í Norðurlondum og stuðul á 250.000 euro um árið er latin til aðrar strategiskar verkætlanir innan krabbamein í Norðurlondum. Harumframt er nýggj granskingarstrategi samtykt, felagsyvirlýsing um nýtslu av solarium er samtykt og nýggj heimasíða er gjørd og tikin í brúk. Eg fegnist tó mest um samstarvið, sum er fingið í lag við Norðurlandaráðið og Norðurlendska Ráðharraráðið á krabbameinsøkinum. Hetta er serliga føroyskum politikkarum fyri at takka.

Norðurlendska Ráðharraráðið hevur biðið Bo Kønberg, fyrrverandi ráðharra í Svøríki, um at skriva eina óhefta frágreiðing um, hvussu norðurlanda samstarvið innan heilsuøkið kann mennast og styrkjast næstu 5-10 árini. Frágreiðingin varð liðug í juni 2014, og arbeitt verður nú fram ímóti at seta tilmælini í verk.

Íslendska krabbameinsfelagið er sera fegið um Norðurlandaráðssamtyktina um tættari samstarv við NCU og um eftirfylgjandi frágreiðingina hjá Bo Kønberg. Ragnheiður Haraldsdóttir, stjóri í Íslendska Krabbameinsfelagnum sigur, at Ísland komandi tíðina fer at leggja nógva orku í at fáa Norðurlandaráðssamtyktina og tilmælini í frágreiðingini hjá Bo Kønberg sett í verk í Norðurlondum.

Her heima vilja vit í Krabbameinsfelagnum framhaldandi styrkja samstarvið við øll, sum varða av krabbamensøkinum. Hetta er fyrst og fremst galdandi í heimliga umhvørvinum, men fevnir eisini um Norðurlond og víðari út í Europa.

*Jákup N. Olsen, formaður.*

# Átøk, samstørv og annað virksemi í 2014

## Súkkla fyri børnum við krabbameini

Á samkomu í Öström í Tórshavn, takkaði Team Rynkeby Føroyar liðið 2014 fyri seg og handaði Krabbameinsfelagnum 760.000 krónur, sum vóru savnaðar inn.

35 súkklarar høvdu síðan september mánað 2013 savnað pening inn til børn við krabbameini og familjur teirra. Flestu pengarnir koma frá sponsorum, men eisini frá tiltøkum, so sum Gallakvøldinum á Hotel Føroyum.

Pengarnir, sum Team Rynkeby Føroyar letur Krabbameinsfelagnum eru oyramerktir til børn við krabbameini. Stuðul varð latin til 4 børn í 2014 og nevndin fyri Team Rynkeby Grunnin hjá Krabbameinsfelagnum er í holt við at leita eftir granskingarverkætlanum at stuðla.

Barnakrabbi er ein álvarslig sjúka. Men viðgerðarmøguleikarnir eru batnaðir seinnu árini, so umleið 80 prosent av teimum børnum, ið fáa staðfest krabbamein, yvirliva.

Summi børn, sum liva við sjúkuni, liva restina av lívinum við fylgjunum av viðgerðini. Nøkur verða lívsør, onnur missa limir, nøkur fáa so álvarsligan heilaskaða, at tey fara ongantíð at kunna liva eitt vanligt lív.

Tann ovurstóra avbjóðingin í at basa sjúkuni er, at barnakrabbi er ikki sum krabbi hjá vaksnum. Í roynd og veru vita granskarar ikki, hví børn fáa krabbamein. Tørvur er á miðvísum granskingararbeiði í barnakrabba, fyri at menna betri og mildari viðgerðarhættir, so børnini ikki einans yvirliva - men kunnu liva eitt vanligt lív.

## Lógaruppskot um 18 ára aldursmark fyri solariumnýtslu

Í sambandi við at Heilsumálaráðið er farið undir at gera uppskot til løgtingslóg um forboð at selja solariumsól til kosmetiskt endamál, hevur Krabbameinsfelagið luttikið í einum arbeiðsbólki hjá Heilsumálaráðnum. Felagið gleðist um, at landsstýrismaðurin í heilsumálum í 2015 ætlar leggur fram lógaruppskot um 18 ára aldursmark fyri at nýta solarium.

## Krabbameinsfelagið og Ljósið halda fram við góða samstarvinum

Rørslutiltakið Firvaldar er fyri tey, ið hava verið ella eru í viðgerð fyri krabbamein. Krabbamein rakar ikki bert tann sjúka. Tí er møguleiki fyri at øll familjan kann vera saman um at venja.

Undirtøkan hevur verið so mikið góð, at avgjørt varð at halda fram við hesum rørslutiltaki í 2015. Tiltakið er ókeypis. Tað eru Beinta Malena Sørensen, fysioterapeutur, og Annika Lindenskov, sjúkrarøktarfrøðingur, frá Ljósinum, sum hava ábyrgdina av liðnum.

### Krabbameinsfelagið luttók á fólkafundi í Runavík

Í sepember mánaði í 2014 luttók Krabbameinsfelagið á fólkafundi í ítróttarhøllini í Runavík. Felagið hevði ein bás, har kunnað varð um felagið.

Tordis Kristiansdóttir, lækni, helt ein áhugaverdan fyrilestur undir heitinum "Bróstkrabbi í Føroyum 1984-2012". Tordis er í fer við, at gera eina granskingarverkætlan innan bróstkrabba í Føroyum. Hon greiddi við fyrilestrinum frá verkætlanini og nýggjastu granskingarúrslitunum. Krabbameinsfelagið stuðlar granskingarverkætlanini.

Nógv fólk vitjaðu á básinum hjá Krabbameinsfelagnum.

### Nýggj starvsfólk

Anna Maria Østerø er farin í farloyvi og Oddbjørg Johansen, sjúkrarøktarfrøðingur og Kognitivur Terapeutur, er sett í farloyvisstarvið.

Á skrivstovuni hjá Krabbameinsfelagnum eru nógvar fyrsitingarligar uppgávur, sum skulu røkjast. Krabbameinsfelagið hevur í november 2014, í samstarv við ALS, fingið skrivstovufólk í starvsvenjing.

## Ráðgevingarstova og hjálparbólkar

Á Ráðgevingarstovuni hjá Krabbameinsfelagnum hevur eins og undanfarin ár verið nógv samskifti og samband við fólk við krabbameini, avvarðandi og onnur. Nógv hava vent sær til felagið, tí tey ynskja at koma til samtalu, bæði einstaklingar og familjur.

Krabbameinsfelagið hevur drúgvar royndir innan alt krabbameinsøkið, og hevur eitt gott og gevandi netverk við atgongd til servitan innan økið. Felagið veitir ta tænstu sum einstaki sjúklingurin og avvarðandi teirra hevur tørv á. Tað er uppgávan hjá Krabbameinsfelagnum at skapa vón og lívsmót, tá ið fólk koma í ta truplu støðu at fáa staðfest krabbamein. Uppgávan er við øðrum orðum at vísa á glottar – lívsglottar og at fáa hesar at víðkast mest møgulig.

Tveir ráðgevandi sjúkrarøktarfrøðingar starvast hjá Krabbameinsfelagnum. Tær vegleiða, hava telefonviðtalu og persónligar samtalur við sjúklingar, familjur og avvarðandi. Sjúklingum stendur eisini í boði at gerast partur av samtalubólkum og sjálvhjálparbólkum. Eisini er ein sosialráðgevi knýttir at felagnum.

Krabbameinsfelagið er talurørið hjá krabbameinssjúklingum og teirra avvarandi. Tað er tí fremsta uppgávan hjá starvsfólkunum at varnast tørv og áhugamál hjá krabbameinsraktum, at menna tænastur og at skipa samskiftisátøk hareftir.

# Nógv virksemi í ymsu bólkunum í 2014

Skipað hevur verið fyri bæði fyrilestrum, hugnaløtum, mótasýning og øðrum átøkum. Her er ein brotpartur av tí, ymsu bólkarnir skipaðu fyri í 2014:

**Prostatabólkurin:** Prostatabólkurin hevur havt fleiri fundir í 2014, og undirtøkan til fundirnar hevur verið sera góð. Formaðurin í bólkinum, Eirikur Ólason Simonsen, luttók á landsfundinum hjá PROPA.

Í januar høvdu teir tiltakið "Menn og krabbamein" á Hotel Føroyum, kvinnur onga atgongd. Umleið 250 menn nýttu høvið at lurta eftir Johan Poulsen, serlækna í urologi og Bjarna Djurholm, løgtingsmanni, sum tvær ferðir hevur verið raktur av krabbameini.

**Bót til Bata:** Skipað hevur verið fyri hugnaløtum og fyrilestri um bróstkrabba. Í mai var hugnaløta á Hotel Hafnia fyri kvinnur, sum hava ella hava haft bróstkrabba, Fía Lamhauge segði frá um Listterapi.

Eins og undanfarin ár varpaði bólkurin í oktober mánaði ljós á bróstkrabba. Tær vóru við í tiltakinum "vælveruvika" í SMS, har Anita á Fríðriksmørk segði frá, um tá hon hevði bróstkrabba.

Í oktober seldu tær endurskinssloyfur og eitt armpríði, sum Turið Mohr hevði sniðgivið. 200 smúkkur vóru gjørdar og allar vórðu seldar upp á stutta tíð, men eftirspurningurin var sera stórur.

Saman við ítróttarfelagnum Treystinum skipaði Bót til Bata fyri "Renn fyri bróstini" í Klaksvík í oktober 2014.

**Undirlívsbólkurin:** Í 2014 skipaði bólkurin fyri nøkrum hugnaløtum, eins og farið varð undir at fyrireika 10 ára dagin sum verður 7. mars í 2015.

Beinta Højsted, forkvinna og Hervør Jensen, limur í undirlívsbólkinum, hava verið á ráðstevnu hjá KIU, ið er bólkur fyri kvinnur í Danmark við krabbameini í undirlívi.

**Móðurmerkjabólkurin:** Í móðurmerkjabólkinum hava vit verið saman eina ferð í 2014, sum er heldur sjáldnari enn vanliga. Bólkurin hevur ikki fingið nýggjar limir seinnu árini, sum vónandi merkir, at tað ikki eru so nógvir nýggir kritiskir tilburðir av móðurmerkjakrabba. Vit vita tó, at ungar gentur eru tær, sum í mestan mun taka sól, og seinasta gallupkanningin vísir hetta sama, at tær framvegis eru fúsar at líða fyri vakurleikan í so máta. Annars vísa nýggj donsk hagtøl, at meðan kvinnur í mestan mun fáa staðfest móðurmerkjakrabbamein, so doyggja munandi fleiri menn av sjúkuni. Menn varnast ofta broytingar í húðini ov seint. Serliga eldri stakir menn eru í vandabólkinum. Higartil er bert ein maður í okkara bólki.

Norðurlendska samstarvið, *Sikkerhed på solferie,* hevur havt ein fund í 2014, har Føroyar eisini vóru umboðaðar. Arbeitt verður áhaldandi við at fáa stórar fyritøkur við umboðan í flestum Norðurlondum at fremja tryggar vanar á ferðum sunnanfyri. Hetta við upplýsing *áðrenn* ferðina, møguleika at vera í skugga heitastu tíðina á degnum, og við rættari atferð *á* ferðini. Hetta er tó eitt arbeiði, ið tekur drúgva tíð, at fáa fyritøkur at skilja, at tað bara eru vinnarar í at kunnað verður um trygga atferð. Tað verður jú ikki frámælt at fara suðureftir – hinvegin verður bert givin nøkur góð ráð at fyribyrgja at fólk verða skáldað.

Saman við leiðsluni í Krabbameinsfelagnum hava vit fingið Smyril Line, sum fyrstu føroysku ferðafyritøkuna at kunna um trygga atferð sunnanfyri á teirra heimasíðu. Tey flestu hava helt varnast, at Atlandic Airways fer at bjóða ferðamál sunnanfyri, sum fastan tátt. Vit arbeiða fyri at fáa fleiri føroyskar fyritøkur at kunna eins og Smyril Line.

**Stomibólkurin:** Stomiambulatoriie á Landssjúkrahúsinum hevur skipað fyri einum hugnakvøldi við undirvísing av fólki, ið hava stomi og teirra avvarðandi. Undirvísarar frá Stomi fyritøku í Danmark og stomisjúkrarøktarfrøðingar frá Stomiambulatorium á Landssjúkrahúsinum hildu fyrilesturin.

**Foreldrabólkurin:** Foreldur at børnum við krabbameini hava skipað fyri jólaborðhaldi fyri familjum, ið hava ella hava havt børn við krabbameini. Krabbameinsfelagið hevur í 2014 havt eitt nýtt tilboð til ung við krabbameini. Hesi hava fingið í boðið at ganga til leirlist hjá Gurðið Poulsen, umframt at skipa varð fyri biograftúrum og farið var út at eta.

## Tilboð til sjúklingar og avvarðandi

Krabbamein rakar ikki bert tann sjúka, men eisini tey avvarðandi. Tí hevur Krabbameinsfelagið aftur í 2014 bjóðað avvarðandi og teimum, ið eru sjúk, eina røð av viðkomandi tilboðum:

**Samtalubólk fyri makar hjá krabbameinsraktum**
Tá ið ein í familjuni gerst sjúkur, kann tað hjálpa at hitta onnur í somu støðu.

Lívshóttandi sjúka hevur ofta við sær broytingar í familjuni. Hesar broytingar kunnu raka familjuna sera meint. Nógvar nýggjar og óvanligar støður taka seg upp, og nógvir tankar og kenslur eru at stríðast við.

Hóast ongin sjúkratilgongd er eins, og støðan hjá hvørjum einstøkum er ymisk, eru tað kortini fleiri viðurskiftir, ið eru eins. Tí kann tað hjálpa at fáa stuðul í einari slíkari støðu og hitta onnur í einum umhvørvi, har tað er í lagi at seta orð á sínar kenslur, hugsanir og fáa stuðul til at loysa ymsar trupulleikar.

Samstundis er hetta eitt frírúm, har makin fær tíð til sín sjálvs. Bólkurin hittist 6-8 ferðir.

## Samtalubólk fyri tey, sum hava mist makan

Endamálið við at savna fólk, ið øll hava mist sín maka, er at geva tí einstaka møguleikan at seta orð á og viðgera tær kenslur, tankar og trupulleikar, sum eru, tá ið tú missir ein maka. Samtalurnar við onnur í somu støðu kunnu stuðla og styrkja víðari í lívinum. Hesin bólkurin hittist 8 ferðir.

## Samtalubólk fyri tey, ið eru sjúk av krabbameini

Hetta tilboðið er gjørt fyri at økja um lívsgóðskuna og styrkja tey, ið eru rakt av krabbameini. Royndirnar vísa, at tað hjálpir at práta við onnur og seta orð á og deila ymiskar upplivingar. Hetta minkar um óttan, og tú fært lættari greiðu á tí, sum bylgist innaní. Tey vóru saman 8 ferðir.

## Listterapi

Í ár var aftur skipað fyri listterapi fyri fólki sum hava, ella hava haft, krabbamein. Átakið var ótrúliga vælumtókt og vóru 2 skeið á 10 vikur hildin í 2014. Fía Lamhauge, listterapeutur, stendur fyri skeiðunum.

## Skeið í húð- og andlitsrøkt fyri kvinnur við krabbameini

Krabbameinsfelagið hevur saman við Make-up Store, skipað fyri skeiði í andlitsrøkt og at leggja make upp. Skeiðið er fyri kvinnur við krabbameini. Skeiðið er ókeypis.

## Familjusamtalur

Familjusjónarhornið hevur stóran týdning í ráðgevandi arbeiðinum hjá felagnum. Tá ið ein í familjuni gerst sjúkur ella doyr, verður øll familjan rakt, eisini børnini.

Børnini skulu liva víðari uttan mammu ella pápa, ímeðan makin stendur einsamallur við ábyrgdini, og er tað ein stór avbjóðing at verða ein "vanlig" familja aftur. Í hesi støðu kann tað vera gevandi og mennandi at hitta aðrar familjur við somu avbjóðingum. Endamálið við familjusamtalum er, at øll í familjuni í felag fáa sett orð á tað, sum er svárt og torført. Á tann hátt fáa hjálp til í felag at stuðla og hjálpa hvør øðrum

## Listterapi

Krabbameinsviðgerð við t.d kemoterapi og strálum ávirkar útsjóndina, og er við til at geva eina broytta kroppsuppfatan. Hetta kann hava við sær, at kvinnur møguliga kenna seg meira sjúka enn tær í veruleikanum eru. Tær kunnu styrkja sjálvsálitið og fáa størri vælveru, við at fáa upplæring og undirvísing í at røkta teirra útsjónd við góðari húðrøkt og make-up.

# Krabbameinshagtøl í 2014

Tilsamans vóru 207 nýggir tilburðir av krabbameini staðfestir í Føroyum í 2014.

Bróstkrabbi, sum millum kvinnur er vanligasta slagið av krabbameini, tykist liggja rættiliga støðugt. Hesi seinastu sjey árini, eru árliga millum 20 og 25 tilburðir staðfestir.

Prostatakrabbi er vanligasta slagið av krabbameini millum menn. Seinastu sjey árini eru millum 21 og 40 tilburðir staðfestir árliga.

Lungnakrabbi telist eisini millum tey vanligastu sløgini av krabbameini. Árliga fáa millum 10-15 føroyingar staðfest lungnakrabba, og liggur hetta rættiliga støðugt.

Tilburðirnir av húðkrabba, sum vóru 22 í 2011 og 52 í 2013 eru nú 49 í 2014. Vónandi heldur talið fram at falla, komandi árini. Hinvegin er talið á skrásettum tilburðum av móðurmerkjakrabba fallið munandi, úr 16 í 2005 niður í 2 tilburðir í 2014.

Tað var eitt stórt framstig, tá føroysku hagtølini í 2009 vóru løgd inn í norðurlendska krabbameinsdátugrunnin Nordcan. Nú ber til at finna føroysku tølini á alnetinum og samanbera tey við onnur lond. Tølini fyri 2014 eru fyribilstøl og skulu takast við fyrivarni.

Niðanfyri her eru fyribils tølini fyri prostata-, húð-, móðurmerkja-, bróst-, maga/tarm-, undirlívs- og lungnakrabba tilburðir í 2014, umframt eitt samlað yvirlit yvir krabbameinstilburðir í Føroyum í tíðarskeiðinum 1995-2014:

## Krabbamein í prostata




Cancer C61 Prostatae

| Antal | Diagn. År | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
| C61 | 7 | 11 | 4 | 7 | 4 | 3 | 4 | 6 | 16 | 12 | 19 | 25 | 30 | 27 | 40 | 30 | 21 | 30 | 32 | 33 |
| *2015/sh* | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |

## Húð og móðurmerkjakrabbamein




Cancer C43, C44
1995 - 2014

| **Antal** | **Diagn. År** | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **1995** | **1996** | **1997** | **1998** | **1999** | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** | **2010** | **2011** | **2012** | **2013** | **2014** |
| **C43** | | **1** | | **2** | **6** | **2** | **4** | **8** | **4** | **10** | **16** | **12** | **6** | **7** | **4** | **7** | **6** | **4** | **6** | **2** |
| **C44** | **16** | **6** | **14** | **8** | **10** | **10** | **16** | **24** | **24** | **31** | **39** | **45** | **41** | **35** | **44** | **45** | **22** | **43** | **52** | **49** |
| *2015/sh* | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |

## Bróstkrabbamein




Cancer mammae C50 1995 - 2014

| **Antal** | **Diagn. År** | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **1995** | **1996** | **1997** | **1998** | **1999** | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** | **2010** | **2011** | **2012** | **2013** | **2014** |
| **C50** | **21** | **17** | **10** | **15** | **8** | **21** | **23** | **23** | **23** | **29** | **17** | **17** | **20** | **21** | **22** | **24** | **20** | **21** | **25** | **24** |
| *2015/sh* | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |

## Lungnakrabbamein




| Cancer pulm. C34 - Krabbamein í lungum 1995 - 2014 | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Antal** | **Diagn. År** | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| | **1995** | **1996** | **1997** | **1998** | **1999** | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** | **2010** | **2011** | **2012** | **2013** | **2014** |
| **C34** | **9** | **14** | **17** | **13** | **10** | **9** | **10** | **22** | **10** | **13** | **13** | **6** | **15** | **17** | **14** | **17** | **11** | **14** | **14** | **15** |
| *2015/sh* | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |

## Maga/tarm krabbamein




Cancertilburðir C15, C16, C17, C18, C19, C20

| **Antal** | **Diagn. År** | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2008** | **2009** | **2010** | **2011** | **2012** | **2013** | **2014** | | | | | | | | |
| **C15** | **6** | **1** | **5** | **4** | **8** | | **5** | | | | | | | | |
| **C16** | **5** | **2** | **4** | **6** | **5** | | **9** | | | | | | | | |
| **C17** | **3** | **0** | **1** | **1** | **2** | | **0** | | | | | | | | |
| **C18** | **15** | **2** | **21** | **26** | **15** | | **16** | | | | | | | | |
| **C19** | **2** | **1** | **1** | **1** | **0** | | **1** | | | | | | | | |
| **C20** | **15** | **7** | **11** | **8** | **12** | | **11** | | | | | | | | |
| *2015/sh* | | | | | | | | | | | | | | | |

## Krabbamein í undirlívinum




Cancer C53, C54, C56

| Antal | Diagn. Ár | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
| C53 | 13 | 8 | 5 | 10 | 4 | 2 | 0 |
| C54 | 2 | 14 | 4 | 2 | 4 | 3 | 4 |
| C55 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| C56 | 1 | 4 | 6 | 5 | 0 | 3 | 5 |
| *2015/sh* | | | | | | | |

## Yvirlit yvir krabbameinstilburðir 1995 - 2014




Yvirlit yvir cancertilburðir 1995 - 2014

| Antal | Diagn. Ár | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
| Cancer | 180 | 201 | 178 | 168 | 182 | 153 | 164 | 171 | 167 | 187 | 207 | 185 | 198 | 188 | 226 | 219 | 188 | 196 | 248 | 207 |
| Diagnosur | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| *2015/sh* | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |

C-15:Cancer oesophagus
C-16:Cancer ventriculi
C-17:Tyndtarm
C-18:Tyktarm
C-19:Rectosigmiodeo
C-20:Recti
C-43:Móðurmerkjakrabbi
C-44:Vanligur húðkrabbi
C-34:Lungnakrabbi
C-50:Cancer mammae
C-53:Cervix uteri
C-54:Corpus uteri
C-55:Livmoder minus specif.
C-56:Ovarii
C-61:Cancer prostatae

Kelda: Krabbameinsskráseting Føroya, Medisinski depilin, Landssjúkrahúsið, FO -100 Tórshavn.

**Heldin** er búmerkið hjá Krabbameinsfelagnum og ímyndar virðisgrundarlagið hjá felagnum. Heldin er gamalt føroyskt hjálparamboð, ið varð nýtt til at bera størri byrðar av hoyggi við.

**Heldin** bæði knýtir saman og loysir eina byrðu aftur.

Soleiðis ynskir Krabbameinsfelagið at hjálpa tær, ið er ella hevur verið sjúk/-ur av krabbameini, so tunga byrðan gerst léttari hjá tær og tínum at bera.